# Mini Concept Frankfurt Stationcar



**Um eitt ár kemur væntandi ein stationcar útgáva av nýggja Mini. Bilurin verður presenteraður sum konseptbilur á altjóða bilaframsýningini í Genéve í hesum mánaðinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tá fyrstu Mini komu á marknaðin í 1959, vóru teir ein sonn kollvelting innan bildesign við t.d. tvørliggjandi motori og hjólunum úti í hvørjum horni. Tað var líka við, at teir vóru størri innan enn uttan.

Longu árið eftir, í 1960, komu teir eisini sum stationcar undir nøvnunum Morris Mini Traveller og Austin Coyntryman. Mini stationcar vóru væl longri enn tann vanligi Mini.

Hesin conseptbilurin líkist gamla Mini stationcar við t.d. at aftastu síðurútarnir eru dragirútar.

Nú er so konseptbilurin Mini Concept Frankfurt Stationcar gjørdur sum ein stationcar útgáva av nýggja Mini, sum verður gjørdur av BMW.

Endalig støða er enn ikki tikin til, nær bilurin kemur á marknaðin, men tað verður helst um umleið eitt ár.

*Eins og á gamla Mini stationcar eru aftastu síðurútarnir dragirútar*




*Mini Concept Frankfurt Stationcar er gjørdur sum ein stationcar útgáva av nýggja Mini*

# Grande Punto mest seldur í Evropa

**Sambært nýggjastu tølunum frá organisatiónini hjá bilframleiðarunum ASEA, er nýggi Fiat Grande Punto, sum júst nú er komin á marknaðin, longu vorðin mest seldi bilur í Evropa**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Nýggi Fiat Grande Punto er longu vorðin mest seldi bilur í Evropa*

Fiat Punto hava í fleiri ár verið millum mest seldu bilar í Evropa í sínum klassa, og hava eisini fleiri ferðir ligið á odda. Nú hevur eisini nýggi Grande Punto longu lagt seg á odda, stutt eftir at hann er komin á marknaðin.

Grande Punto er ein tann størsti bilurin í sínum klassa. Hann verður gjørdur við bæði trimum og fimm hurðum. Bilurin fekk fimm stjørnur og fult stigatal, tá hann varð trygdartestaður hjá EuroNCAP.

Bildesignarin Giorgetto Guigiaro frá Ital Design hevur teknað bilin, sum líkist italska luksus sportbilinum Maserati, ið hann eisini hevur teknað.

Sambært tíðindaskrivi frá Fiat er orsøkin til góðu móttøkuna hjá Grande Punto designið, og tað at bilurin hevur nógvar trygdarskipanir sum standard, samstundis sum hann er rúmligur og kappingarførur í prísi.

Grande Punto kann síggjast og roynast hjá Nordcar í Smiðjugerði. Bíligasta útgávan: 1,2 Active við trimum hurðum kostar 139.000 krónur.






**SUBARO LIBERO 4-WD**
Brúktur 7-persóna minibussur vi› el-dragitaki, tveimum dragihur›um og stereoanleggi. Bilurin sær gott út og er vælhildin. Kr. 49.800. Hygg eisini á heimasí›una: www.firexfire.dk.
**Tlf. +45 40186050**

- **Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum**
- **Vit umvæla øll bilmerki**
- **Klárgering til sýn**
- **Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.**



**Ring og fá eitt tilboð**

**Sp/f Plátuverkstaðið**
**Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778**
**Teldupostur: plv@plv.fo**